# VESTMANNA KOMMUNA

## FÍGGJARÆTLAN

## FYRI

## 2016

Vestmanna Kommuna · Bakkavegur 8 · Postsmoga 91 · 355 Vestmanna
Tlf. 770 100 · Fax 770 101 · T-postur: vestmanna@vestmanna.fo · www.vestmanna.fo

## Góðu Vestmanna-borgarar

Eins og undanfarin ár verður fíggjarætlanin hjá Vestmanna Kommunu fyri 2016 send hvørjum húski í bygdini.
Vit vóna, at fíggjarætlanin við stuttari frágreiðing gevur tykkum eitt gott innlit í raksturin og løgurnar hjá Vestmanna Kommunu.

**Árið 2015**
Árið 2015 hjá Vestmanna Kommunu hevur hilnast væl.

Skattainntøkurnar íroknað reguleringar teir fyrstu 11 mánaðirnar í ár vóru 37,5 mió. kr. Við ársenda verður inntøkar væntandi 40,5 mió. kr. (við reguleringum). Hetta hóast skattaprocentið varð sett niður úr 23% í 22% frá 1. januar í ár.

Í búgvaratalið í Vestmanna Kommunu hevur verið støðugt seinastu mongu árini, og tað sær út til at halda áfram. 1. november í ár búðu 1216 fólk í Vestmanna Kommunu móti 1207 1. november í fjør.

| **Skuld ársbyrjan 2015** | **Skuld ársenda 2015 (væntandi)** |
|---|---|
| Kr. 36.881.807 | Kr. 30.000.000 |

Av tí at skattainntøkurnar eru góðar, og at bygdarráðið samstundis hevur hildið nakað aftur á útreiðslusíðini, fer Vestmanna Kommuna í ár at megna at gjalda knappar 7 mió. kr. niður av skuldini, so hon um ársskiftið væntandi verður komin niður á 30 mió. kr.

**Heilsumiðstøðin**
Arbeiðið at gera nýggju heilsumiðstøðina í Gørðum varð liðugt í august mánað, og hon varð tikin í nýtslu beinanvegin.
Enn er eingin kommunulækni í føstum starvi, men Heilsumálaráðið hevur boðað frá, at í næstum verður søkt eftir kommunulækna til Vestmanna læknadømi.

**Vestmannadagarnir**
Triðja árið á rað skipaðu vit fyri Vestmannadøgum – hesaferð eisini í september mánað - og vit fegnast um, at dagarnir vóru so væl eydnaðir. Nógv tiltøk vóru á skránni, og tey vóru øll væl vitjað.
Leygarmorgunin møttu umleið 1.000 fólk til felags morgunmatin.
Vestmanna Kommuna vil við hesum takka øllum so hjartaliga fyri, at tikið var so væl undir við døgunum, og eisini ein serlig tøkk til øll tykkum, sum á einhvønn hátt hjálptu til við fyrireikingum og øðrum.

**Rakstur og íløgur í 2016**
Rakstur og íløgur hjá Vestmanna Kommunu hækka nakað frá 2015 til 2016. Hetta kemst av, at inntøkurnar vaksa; bæði kommunuskatturin, partafelagsskattur o.a.. Av tí at kommunan hevur goldið heilsumiðstøðina í 2015 uttan lánitøku, verður eisini hesin peningurin tøkur í 2016.

**Kommunuskattaprosentið lækkar**
Vestmanna Bygdarráð frøist um, at kommunan annað árið á rað kann lætta enn meira um hjá borgarunum við at seta kommunuskattin niður í 21,5 prosent.
Harafturat hækkar barnafrádrátturin úr kr. 4.000 og upp í kr. 5.000 pr. barn.

**Barnaansingargjald**
Foreldragjaldið á dagstovnunum verður óbroytt í 2016, kr. 1.800 um mánaðin, og fyri frítíðaransingina kr. 1.100 um mánaðin. Samanborið við aðrar kommunur er foreldragjaldið í Vestmanna Kommunu undir miðal, og gjaldið hevur verið óbroytt seinastu 8 árini.

| | | |
|---|---|---|
| **Samtykt arbeiði at seta í verk í 2016** | | |
| **Teknisk mál** | | |
| Asfaltering og vegagerð | Kr. | 6.000.000 |
| Projektering av 2. parti av útstykking uppi í Vestri | Kr. | 150.000 |
| Kloakkir | Kr. | 300.000 |
| **Havnin, umvælingar** | | |
| Umvælingar o.a. | Kr. | 1.250.000 |
| **Vestmanna Skúli** | | |
| tak, ljóðdoyving, vindeygu, brúgv, o.a. | Kr. | 661.000 |
| Reinsiskipan til svimjihylin | Kr. | 274.000 |
| Telduútbúnaður til skúlan | Kr. | 100.000 |
| **Sløkki- og bjargingarliðið** | | |
| Stigabilur | Kr. | 300.000 |
| **Fríðkan o.a.** | | |
| Johnsa handil, umvælingar | Kr. | 200.000 |
| Hylurin við Johnsa handil | Kr. | 400.000 |
| Sýslumanshúsini, tak o.a. | Kr. | 300.000 |
| Kirkjugarður, ljós | Kr. | 150.000 |
| Liðugtgerð av plássinum har Geilin stóð | Kr. | 150.000 |
| **Dagstovnaøkið** | | |
| Útlufting og uttanumøki | Kr. | 150.000 |

**Útgreining av talvuni omanfyri**
Bygdarráðið hevur fyri 2016 samtykt at seta 6 mió. kr. av til asfaltering og vegagerð. Hendan upphæddin verður m.a. nýtt til at gera part av Niðara Vegi, og til asfaltering av størri strekki í bygdini.
Fleiri umvælingar verða gjørdar á havnaøkinum; m.a. umvælingar í bátahylinum, við ferjuleguna og á gomlu kei.
Í Vestmanna Skúla skulu umvælingar gerast á takið á Kongsteigum, fleiri vindeygu verða skift, gongubrúgvin um Gjógvará skal umvælast, v.m.
Verandi stigabilur er í ringum standi, og tí er upphædd sett av til at keypa nýggjan stigabil.

**Vetrarfriðing**
Vestmanna Kommuna gjørdi í summar avtalu við Fjalshaga um at friða part av teirra vetrarbiti, og er kommunan komin á mál við at vetrarfriða Fjalshaga.
Avtala er eisini gjørd við Heygahaga fremru helvt um vetrarfriðing, og byrjar hetta arbeiðið beint eftir nýggjár.
Vestmanna Kommuna er í samráðingum við Neshaga um at vetrarfriða Neshaga, men tær samráðingarnar eru ikki lidnar enn.

**John'sa handil**
Nógv virksemi er í John'sa handli alt árið. Krambúðin, Norðstreymoyar Heimavirkisfelag, er opin stóran part av árinum, umframt at skipað verður fyri bæði konsertum og øðrum tiltøkum í Vektarbúðini. Eisini er húsið miðdepil fyri konsertum og fyrilestrum allar Vestmannadagarnar.
Farið verður undir at umvæla bygningin innan og uttan í 2016, so umstøðurnar í John´sa handli og økinum niðanfyri verða enn betur.

Vestmanna bygdarráð takkar øllum vestmenningum fyri gott samstarv og ídni.

Við ynski um gleðilig jól og gott nýggjár

Pauli T. Petersen
borgarstjóri

# Vestmanna Kommuna

## Fíggjarætlan 2016

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | Heiti | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Samsýningar til bygdarráðið** | | |
| 1.041.096 | | Lønir | 1.063.340 | |
| 106.375 | | Rakstrarútreiðslur | 106.375 | |
| | **1.147.471** | | | **1.169.715** |
| | | **Val og valnevndir** | | |
| 21.000 | | Lønir | 21.000 | |
| 19.125 | | Rakstrarútreiðslur | 19.125 | |
| | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **40.125** | | | **40.125** |
| | | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 2.128.310 | | Lønir | 2.167.324 | |
| 1.281.563 | | Rakstrarútreiðslur | 1.388.938 | |
| -354.000 | | Rakstrarinntøkur | -270.000 | |
| | **3.055.872** | | | **3.286.262** |
| | | **Skattakærunevndin** | | |
| 68.000 | | Lønir | 71.000 | |
| 36.000 | | Rakstrarútreiðslur | 36.000 | |
| -73.000 | | Rakstrarinntøkur | -73.000 | |
| | **31.000** | | | **34.000** |
| | | **Føroya Kommunfelag** | | |
| 200.000 | | Rakstrarútreiðslur | 200.000 | |
| | **200.000** | | | **200.000** |
| | | **Hvíldarheimið Naina** | | |
| 125.000 | | Rakstrarútreiðslur | 125.000 | |
| | **125.000** | | | **125.000** |
| | | **Kommunulæknaútreiðslur** | | |
| 52.094 | | Lønir | 54.688 | |
| 179.063 | | Rakstrarútreiðslur | 285.313 | |
| -36.000 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **195.157** | | | **340.000** |
| | | **Heilsurøkt skúlin** | | |
| 9.000 | | Rakstrarútreiðslur | 9.000 | |
| | **9.000** | | | **9.000** |
| | | **Læknamiðstøð** | | |
| 148.506 | | Lønir | 81.725 | |
| 136.875 | | Rakstrarútreiðslur | 355.750 | |
| -60.000 | | Rakstrarinntøkur | -100.000 | |
| | **225.381** | | | **337.475** |
| | | **Læknamiðstøð, íløga** | | |
| 5.525.000 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| | **5.525.000** | | | **0** |

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Tannrøkt** | | |
| 862.000 | | Lønir | 879.000 | |
| 160.000 | | Rakstrarútreiðslur | 160.000 | |
| -375.000 | | Rakstrarinntøkur | -315.000 | |
| | **647.000** | | | **724.000** |
| | | **Barnaverndartænastan** | | |
| 1.370.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.410.000 | |
| | **1.370.000** | | | **1.410.000** |
| | | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 92.000 | | Rakstrarútreiðslur | 92.000 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **92.000** | | | **92.000** |
| | | **Heimatænastan VEKS** | | |
| 11.740.000 | | Flyting til eldrasamstarv | 12.507.000 | |
| -1.681.000 | | Leigugjald fyri "Heimið á Grønanesi" | -1.681.000 | |
| | **10.059.000** | | | **10.826.000** |
| | | **Fíggjarlig frípláss** | | |
| 325.000 | | Rakstrarútreiðslur | 325.000 | |
| | **325.000** | | | **325.000** |
| | | **Staðið - ungdómshús** | | |
| 519.629 | | Lønir | 495.062 | |
| 185.000 | | Rakstrarútreiðslur | 224.125 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **704.629** | | | **719.187** |
| | | **Dagstovnaøkið, Gjáarlon og Látipípan** | | |
| 6.351.930 | | Lønir | 8.600.543 | |
| 618.625 | | Rakstrarútreiðslur | 753.188 | |
| -1.504.000 | | Rakstrarinntøkur | -2.161.000 | |
| | **5.466.555** | | | **7.192.730** |
| | | **Látipípan (I 2016 lagt saman við Gjáarlon)** | | |
| 1.592.443 | | Lønir | 0 | |
| 252.938 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| -415.000 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **1.430.381** | | | **0** |
| | | **Látipípan (Í 2016 lagt saman við Gjáarlon)** | | |
| 537.270 | | Lønir | 0 | |
| -50.500 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| -242.000 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **244.770** | | | **0** |
| 450.000 | | **Stuðlar børn í dagstovni** | | |
| | **450.000** | Lønir | 455.000 | |
| | | | | **455.000** |

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Fólkaskúlin** | | |
| 85.000 | | Lønir | 85.000 | |
| 825.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.042.813 | |
| | **910.000** | | | **1.127.813** |
| | | **Fólkaskúlin, bygningar o.a.** | | |
| 2.107.033 | | Lønir | 2.107.033 | |
| 787.165 | | Rakstrarútreiðslur | 1.144.250 | |
| -425.000 | | Rakstrarinntøkur | -425.000 | |
| | **2.469.198** | | | **2.826.283** |
| | | **Serundirvísing, fólkaskúlin** | | |
| 38.000 | | Rakstrarútreiðslur | 38.000 | |
| | **38.000** | | | **38.000** |
| | | **Lærlingaútreiðslur** | | |
| 120.000 | | Rakstrarútreiðslur | 120.000 | |
| | **120.000** | | | **120.000** |
| | | **Musikkskúlin** | | |
| 150.000 | | Lønir | 153.000 | |
| 327.750 | | Rakstrarútreiðslur | 327.750 | |
| -46.000 | | Rakstrarinntøkur | -46.000 | |
| | **431.750** | | | **434.750** |
| | | **Kvøldskúlin** | | |
| 188.000 | | Lønir | 191.000 | |
| 20.625 | | Rakstrarútreiðslur | 36.563 | |
| -130.000 | | Rakstrarinntøkur | -130.000 | |
| | **78.625** | | | **97.563** |
| | | **Mentanarmál** | | |
| 34.000 | | Lønir | 37.000 | |
| 455.000 | | Rakstrarútreiðslur | 401.875 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **489.000** | | | **438.875** |
| | | **Skúla- og bygdarbókasavn** | | |
| 57.000 | | Lønir | 59.000 | |
| 122.000 | | Rakstrarútreiðslur | 122.000 | |
| -55.000 | | Rakstrarinntøkur | -55.000 | |
| | **124.000** | | | **126.000** |
| | | **Vestmanna bygdarsavn** | | |
| 14.000 | | Lønir | 15.000 | |
| 388.563 | | Rakstrarútreiðslur | 261.063 | |
| -26.000 | | Rakstrarinntøkur | -26.000 | |
| | **376.563** | | | **250.063** |
| | | **Ítróttarhøll** | | |
| 790.000 | | Rakstrarútreiðslur | 790.000 | |
| | **790.000** | | | **790.000** |

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 542.550 | | Lønir | 489.126 | |
| 504.938 | | Rakstrarútreiðslur | 814.125 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **1.042.488** | | | **1.298.251** |
| | | **Hegn og bøgarðar** | | |
| 328.000 | | Lønir | 328.000 | |
| 222.063 | | Rakstrarútreiðslur | 222.063 | |
| | **550.063** | | | **550.063** |
| | | **Byggibúning** | | |
| 0 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| -200.000 | | Rakstrarinntøkur | -200.000 | |
| | **-200.000** | | | **-200.000** |
| | | **Kirkjugarðarnir og minnisvarðin** | | |
| 54.000 | | Lønir | 59.000 | |
| 219.938 | | Rakstrarútreiðslur | 225.250 | |
| | **273.938** | | | **284.250** |
| | | **Líkvognur** | | |
| 57.000 | | Lønir | 59.000 | |
| 26.000 | | Rakstrarútreiðslur | 26.000 | |
| -63.000 | | Rakstrarinntøkur | -63.000 | |
| | **20.000** | | | **22.000** |
| | | **Vatnveiting** | | |
| 353.000 | | Lønir | 359.000 | |
| 216.688 | | Rakstrarútreiðslur | 219.188 | |
| -4.000 | | Rakstrarinntøkur | -4.000 | |
| | **565.688** | | | **574.188** |
| | | **Kloakkir** | | |
| 296.000 | | Lønir | 302.000 | |
| 331.000 | | Rakstrarútreiðslur | 437.250 | |
| -18.000 | | Rakstrarinntøkur | -18.000 | |
| | **609.000** | | | **721.250** |

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Vegir** | | |
| 301.000 | | Lønir | 307.000 | |
| 877.438 | | Rakstrarútreiðslur | 7.148.313 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **1.178.438** | | | **7.455.313** |
| | | **Gøtusóping o.a.** | | |
| 296.000 | | Lønir | 302.000 | |
| 85.000 | | Rakstrarútreiðslur | 85.000 | |
| | **381.000** | | | **387.000** |
| | | **Gøtuljós** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 570.563 | | Rakstrarútreiðslur | 570.563 | |
| | **570.563** | | | **570.563** |
| | | **Maskinhøllin** | | |
| 186.000 | | Lønir | 356.000 | |
| 722.750 | | Rakstrarútreiðslur | 563.375 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **903.750** | | | **914.375** |
| | | **Renovasjón** | | |
| 148.000 | | Lønir | 148.000 | |
| 1.926.313 | | Rakstrarútreiðslur | 1.926.313 | |
| -20.000 | | Rakstrarinntøkur | -20.000 | |
| | **2.054.313** | | | **2.054.313** |
| | | **Grind** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 18.688 | | Rakstrarútreiðslur | 18.688 | |
| | **18.688** | | | **18.688** |
| | | **Sløkki- og bjargingarliðið** | | |
| 293.000 | | Lønir | 293.000 | |
| 304.688 | | Rakstrarútreiðslur | 623.438 | |
| | **597.688** | | | **916.438** |
| | | **Havnin** | | |
| 521.405 | | Lønir | 532.272 | |
| 601.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.746.000 | |
| -980.000 | | Rakstrarinntøkur | -1.000.000 | |
| | **142.405** | | | **1.278.272** |
| | **45.898.493** | **Rakstur og íløgur - samantalt** | | **50.379.800** |

| 2015 Salda | 2015 Samanteljing | | 2016 Salda | 2016 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstur og íløgur - samantalt** | | |
| 1.000.000 | **1.000.000** | **Rentustuðul, stuðul til rentuútreiðslur** | 1.000.000 | **1.000.000** |
| 980.500 | **980.500** | **Rentugjaldingar, rentuútreiðslur** | 600.000 | **600.000** |
| 0 | **0** | **Rentugjaldingar, rentuinntøkur** | 0 | **0** |
| -36.000.000 | **-36.000.000** | **Kommunuskattur 22%** | -39.090.909 | **-39.090.909** |
| -1.400.000 | **-1.400.000** | **Felagsskattur** | -2.000.000 | **-2.000.000** |
| 0 | **0** | **Avgjald av kapitaleftirlønum** | 0 | **0** |
| -8.900.000 | **-8.900.000** | **Skattur av eftirlønargjøldum** | -9.211.000 | **-9.211.000** |
| -2.840.000 | **-2.840.000** | **Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir** | -2.885.000 | **-2.885.000** |
| -710.000 | **-710.000** | **Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið** | -411.000 | **-411.000** |
| | **-47.869.500** | **Skattur o.a. - samantalt** | | **-51.997.909** |
| 1.500.000 | **1.500.000** | **Afturgjald av skuld** | 0 | **0** |
| **Vinningur** | **-471.007** | **Vinningur** | | **-1.618.109** |

Samtykt á bygdarráðsfundi 09.11.2015

Pauli T. Petersen
borgarstjóri